# ítróttur

Nr. 39 • hósdagur • 23. februar 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo


# Føroyar vendu dystinum

**Hóast tað ikki var í tráð við leikgongdina, kom Lynn University á odda í fyrra hálvleiki. Í seinna hálvleiki vendi Føroyar dystinum og vunnu 3-1**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Mikudagin spældu Føroyar fyrsta venjingardyst á venjingarleguni í Florida. Dysturin var ímóti Lynn University, og tað endaði við føroyskum sigri.

Føroyar byrjaðu dystin væl, men so við og við dovnaði spælið nakað, og nakað fyri hálvleik legði Lynn University seg fram um 1-0.

Í hálvleikinum vórðu nógvar skiftingar gjørdar, og í seinna hálvleiki gekk spælið betur.

Rasmus Nolsøe javnaði, tá ið hann skoraði beinleiðis upp á hornaspark. Rógvi Jacobsen legði Føroyar fram um, tá ið hann stútaði horna í málið. Og so var tað nýggi landsliðsspælarin Hanus Thorleifsson, sum kundi seta punktum við triðja føroyska málinum. í dystinum.



*Rógvi Jacobsen skeyt næsta av føroysku málunum*

**FAKTA**

Venjingardystur, 22. februar 2006

**Lynn University-Føroyar 1-3 (1-0)**
**1-0:**
**1-1:** Rasmus Nolsøe
**1-2:** Rógvi Jacobsen
**1-3:** Hanus Thorleifsson
**Føroyar:** Jákup Mikkelsen (Bárður Johannesen, 46.) – Mortan í Hørg (Jann Ingi Petersen, 46.), Óli Johannesen (Hans Pauli Samuelsen, 75.), Atli Danielsen (Rasmus Nolsøe, 46.), Heðin á Lakjuni (Janus Joensen, 46.) – Christian Høgni Jacobsen (Hjalgrím Elttør, 60.), Jákup á Borg (Rógvi Jacobsen, 46.), Pauli Hansen (Kári Nielsen, 46.), Fróði Benjaminsen (Hanus Thorleifsson, 60.), Símun Samuelsen (Bergur Midjord, 46.) – Andrew av Fløtum (Jonhard Frederiksberg, 46.)

# Dráttur snávaði ímóti KÍF

**Kvinnurnar hjá Drátti kundi tikið ein týðandi stig ímóti gullinum í meistaradeildini í flogbólti, men liðið tapti púra óvæntað ímóti botnliðnum KÍF í gjárkvøldið**

FLOGBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Dráttur hevur verið suverent lið í meistaradeildini hjá kvinnum í flogbólti. Liðið liggur langt á odda, og tað hevur bara verið spurningur um dagar, áðrenn liðið tryggjaði sær FM-heitið.

Mikukvøldið kundi liðið taka eitt avgerandi stig fram ímóti FM-heitinum, men Dráttur snávaði í dystinum ímóti KÍF.

Kvinnurnar úr Kollafirði vunnu nevniliga dystin í Hoyvíkshøllini 3-1. KÍF vann fyrsta sett 25-21, og síðani vann Dráttur 25-18. Men tey, sum hildu at oddaliðið hevði vent dystinum fóru skeiv, tí KÍF vann næstu settini 27-25 og 25-12.



*Oddaliðið Dráttur tapti mikukvøldið dystin ímóti botnliðnum KÍF*

### Ein feril av spenningi

Nú má Dráttur útseta vissuna um FM-heitið. Dráttur er seks stig frammanfyri TB, men TB hevur spælt ein dyst færri, og vinna kvinnurnar av Tvøroyri hendan dystin, kunnu tær minka um munin niður í fýra stig áðrenn tríggjar teir seinastu dystirnar.

Tað skal framvegis nógv til at koppa Drátti, men við óvæntaða úrslitinum mikukvøldið er eitt lítið vet av spenningi komið í kappingina aftur.

VÍF-Tjaldur
23-24 (9-14):

# Næsti sigurin á rað

**Tjaldur kom seint ígongd við endaspurtin. Eftir at tær ongan dyst vunnu í tvey ár, vunnu tær báðar teir seinastu dystirnar hetta kappingarárið. Men niðurflytingin er kortini veruleiki**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Niðurflytingin var longu veruleiki hjá báðum liðunum báðum, áðrenn farið varð undir dystin. Men við nývunna sigrinum á StÍF seinasta vikuskifti, hevði Tjaldur kanska størri sjálvsálit hesaferð.

Gjøgnum fyrra hálvleik togaðu tær seg eisini væl framum, men eftir steðgin kom stígur í. Tjaldur skeyt bara eitt mál fyrsta korterið av seinna hálvleiki, og hetta brúkti VÍF til at leggja seg greitt á odda. Seinasta korterið av kappingarárinum hjá teimum báðum liðunum koppaði tó aftur hinvegin. Hetta korterið vann Tjaldur 8-4, og við seinasta málinum frá Maju Hecimovic, megnaðu tær fyri aðru ferð á rað at fáa tvey stig til høldar.

**Fakta um dystin**

**VÍF-Tjaldur**
**23-24 (9-14)**

**Málskjúttar**
**VÍF:** Jacklin Durhuus 10(2), Bjørg Patursson 4, Tórgunn Johannesen 4(1), Heidi Joensen 3, Finngerð Jensen 2
**Tjaldur:** Maja Hecimovic 6(1), Jacoba Langgaard 4, Heidi Sevdal 3, Beinta Joensen 2, Mona Langgaard 2, Elinbjørg Hammer 2, Marian Isaksen 2, Jasmina Devovic 2(1), Kristine Ellingsgaard 1
**Brotskøst:** VÍF 4, Tjaldur 7
**Útvísingar:** VÍF 2, Tjaldur 2
**Diskvalifikatión:** VÍF 1 (Beinleiðis reytt)
**Dómarar:** Andreas F. Hansen & Eyðun Samuelsen